# Dugni søkir eftir lærara til skúlan við Áir

**Vegna sjúkrafarloyvi verður søkt eftir lærara at byrja beinavegin.**

Lærigreinirnar eru føroyskt, støddfrøði, alis-/evnafrøði, søga og landalæra í 9. flokki og støddfrøði D (FHS).

Vikutímatalið er 20 undirvísingartímar.

Talan kann eisini verða um lærara, sum átekur sær at undirvísa í nøkrum av lærugreinunum.

**Frágreiðing um virksemið hjá Dugna**
Dugni er ein endurbúgvingarstovnur, hvørs endamál er m.a. at geva vinnutarnaðum møguleika, at skúla ella umskúla seg til at fara útbúgvingarvegin.

Sí meira um okkum á heimasíðu okkara **www. dugni.fo**

**Løn og setanartreytir**

- Starvið verður sett við tilvísing til leiðaran á skúlanum.
- Starvið verður at seta beinavegin og fram til 1. oktobur 2010.
- Lønin er eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag/ Lærarafelag Handilsskúlans.

Fleiri upplýsingar fáast hjá Mai-Britt Holm Andersen, leiðara, á tlf. 292980

**Umsóknarfreist og setanarsamrøður**
Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. august 2010.

Setanarsamrøður verða 24 ella 25. august 2010 og tann setti byrjar beinavegin.

Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m. skal sendast til dugni@dugni.fo ella til:

**Dugni**
**Boks 301**
**110 Tórshavn**
**brævbjálvin skal viðmerkjast: "umsókn lærari"**

dugni

DUGNI@DUGNI.FO · WWW.DUGNI.FO

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# SLØKKILIÐSFÓLK TIL FUGLAFJARÐAR SLØKKILIÐ

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir sløkkilisfólki M/K til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 15. september 2010 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan, revsiváttan og stóra koyrikortið. Tó kunnu persónar, sum ikki lúka krøvini fyri koyrikortið, søkja størvini við teirri treyt, at hetta verður fingið til vega skjótast, um teir/tey verða settir í starv.

Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarar antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmonnum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsingar um starvið eru at fáa frá brunastjóranum Jóhann Clementsen á tlf. 737800

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða

Fuglafjarðar kommunu
Ennivegur 38
530 Fuglafjaørður

í hendi í seinasta lagi 10. sept. 2010 kl. 15.00

Kommunan skilar sær rætt at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður 16. august 2010*

**Fuglafjarðar kommuna**

# Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

**FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir**

## *Hjálparfólki til breyðsøludeildina*

**at byrja skjótast til ber**



Vit sóknast eftir einum røskum fólki, við góðum røkiskapi og áræði, til fast starv í einum handli, sum lív altíð er í.

**Arbeiðsuppgávur:**

At røkja starvið sum hjálparfólk í breyðsøludeild okkara.

**Arbeiðstíð:**

Um 30 tímar um vikuna, (3/4 tíð), harav annan hvønn hósdag fyrrapart og annan hvønn leygardag fyrrapart

Vit rokna við, at tú ert:

- Røkin, álítandi og fleksibul
- Blíðlíg/ur av lyndi
- Trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum

**Løn:**
Smbrt. S & K sáttmálanum

Send okkum nøkur orð um teg sjálva/n til:

Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bogi Vík, tel 228222

fk

# Matseðil

Hósdagin 19. august
**Stoktur høsnarungi / Rivjasteik**

Fríggjadagin 20. august
**Stoktur medistari / Chilly con Carne / Nakkafillét**

Leygardagin 21. august
**Entrecôte**

Mánadagin 23. august
**Forlorin hara / Knettir / Fiskafrikadellur**

Týsdagin 24. august
**Grýturættur / Royktur medistari**

Mikudagin 25. august
**Kjøtfrikadellur / stoktur fiskur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**



# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 288233)**

Sosialin

-so eru tit við!

# DJÓRAHANDILIN sp/f

Jansstovugøta 5 - Box 3274 - 110 Tórshavn - Faroe Islands
Tlf (00 298) - 31 88 77 - Fax - 31 49 11 – mail: akva-b@olivant.fo

## DJÓRAHANDILIN SØKIR EFTIR STARVSFÓLKI

Vit søkja eftir einum blíðum og vinarligum starvsfólki til m.a. at avgreiða kundar, goymslustýring og at passa djór og akvarium.

Vit vænta av tær, at tú hevur kunnleika og áhuga fyri djórum og akvariumfiskum, at tú kann arbeiða sjálvstøðugt, at tú hevur koyrikort, tí roknast kann við nakað av koyring til og frá okkara goymslu, og at tú hevur góðan telduførleika.

Tú mást vera fyrikomandi og kundavinarlig/ur.

Skipað verður fyri upplæring, og hetta krevur nakað av lestri.

Arbeiðstíðin er frá 11.00 til 18.00 dagliga og leygardagar frá 10.00 til 14.00

Skriftlig umsókn við møguligum viðmælum og prógvum skulu sendast til:

**Djórahandilin**
Jansstovugøta 5
Boks 3274
110 Tórshavn
**t-Post:** akva-b@olivant.fo

**Umsóknarfreist:** 30.08.10